

*ja, tað kann vera ørkymlandi at finna útav próvtalinum, nú próvtalsstigin í Danmark er broyttur frá 13 til 7. Men á talvunum her á síðuni kanst tú umseta próvtal fyri próvtal og miðaltal fyri miðaltal frá tí gamla til tann nýggja stigan. So lætt er tað*

# 7-talsstigin ikki klárur enn

**Hóast hann hevur verið nýttur uttanlands í fleiri ár, og ætlanin var at seta hann í gildi her heima í summar, so kemur nýggi próvtalsstigin ikki í gildi í Føroyum fyrr enn við skúlaársbyrjan í 2011**

NÝGGJ PRÓVTØL
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

Síðani 2007 hevur upptøkan til hægri lærustovnar, sum áður hava nýtt 13-stigan, verið roknað út eftir nýggja 7-talsstiganum.

Her heima skuldi nýggja próvtalsskipanin eisini verið sett í gildið í summar. Umframt nýggja próvtalsstigan, hevur eisini verið arbeitt við at gera nýggjar námsætlanir til bæði fólka-, miðnáms- og vinnuskúlarnar, men hetta arbeiði verður ikki liðugt í summar, sum annars ætlað.

Í heyst vóru hoyringar- og kunningarfunir kring landið, og landstýriskvinnan við mentamálum hevur sett eina ritstjórn at viðgera tilfarið, sum er komið frá skúlunum og at við gera uppskotini til nýggjar námsætlanir.

Hon hevur givið ritstjórini alt hetta árið til arbeiðið, og av tí at námsætlanir og nýggi próvtalsstigin skulu fylgjast at, má próvtalsstigin eisini bíða inntil 2011.

### At umseta próvtølini

Tað kann vera møtumikið at finna útav, hvussu gamli stigin skal umsetast til tann nýggja, men niðanfyri eru tvær talvur, ið vónandi lætta um.

Tað eru tveir hættir at rokna út eftir. Onnur talvan umsetir miðaltalið eftir gamla stiganum til miðaltalið eftir nýggja stiganum. Hin talvan umsetir einstøku próvtølini hvør sær.

Harumframt skalt tú hava í huga, at um tú søkir inn á eina hægri útbúgving innan tvey ár eftir, at tú hevur lokið miðnámsskúlaprógv, kanst tú falda próvtalið við 1,08, og harvið hækka tað miðaltalið, sum tú kanst søkja inn við.

| 13-STIGIN | 7-TALSSTIGIN |
|---|---|
| 13 | 12 |
| 11 | 12 |
| 10 | 10 |
| 9 | 7 |
| 8 | 7 |
| 7 | 4 |
| 6 | 02 |
| 5 | 00 |
| 03 | 00 |
| 00 | -3 |

*Umrokning av einstøku próvtølunum frá 13-stiganum til 7-talsstigan*

| 13-STIGIN | 7-TALSSTIGIN | 13-STIGIN | 7-TALSSTIGIN |
|---|---|---|---|
| 6,0 | 2,0 | 8,7 | 7,5 |
| 6,1 | 2,2 | 8,8 | 7,7 |
| 6,2 | 2,4 | 8,9 | 8,0 |
| 6,3 | 2,6 | 9,0 | 8,2 |
| 6,4 | 2,8 | 9,1 | 8,4 |
| 6,5 | 3,0 | 9,2 | 8,6 |
| 6,6 | 3,2 | 9,3 | 8,8 |
| 6,7 | 3,4 | 9,4 | 9,0 |
| 6,8 | 3,6 | 9,5 | 9,2 |
| 6,9 | 3,7 | 9,6 | 9,4 |
| 7,0 | 3,9 | 9,7 | 9,6 |
| 7,1 | 4,1 | 9,8 | 9,8 |
| 7,2 | 4,3 | 9,9 | 10,0 |
| 7,3 | 4,5 | 10,0 | 10,2 |
| 7,4 | 4,7 | 10,1 | 10,4 |
| 7,5 | 4,9 | 10,2 | 10,5 |
| 7,6 | 5,1 | 10,3 | 10,7 |
| 7,7 | 5,3 | 10,4 | 10,8 |
| 7,8 | 5,5 | 10,5 | 11,0 |
| 7,9 | 5,8 | 10,6 | 11,2 |
| 8,0 | 6,0 | 10,7 | 11,4 |
| 8,1 | 6,2 | 10,8 | 11,6 |
| 8,2 | 6,4 | 10,9 | 11,8 |
| 8,3 | 6,6 | 11,0 OG HÆGRI | 12,0 |
| 8,4 | 6,8 | | |
| 8,5 | 7,1 | | |
| 8,6 | 7,3 | | |

*Umrokning av miðaltalinum frá 13-stiganum til 7-talsstigan*